## Mercedes Benz 200 D



Árgang 1966, koyrt 88.000 km, reyður, diesel. Ellisakfar í góðum standi. Bilurin er høvuðsumvældur og lakkeraður fyri trimum árum síðani.

## Opel Kadett



Árgang 1973, einans koyrt 54.000 km, reyður, bensin. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur havt ein eigara tey fyrstu 28 árini.

## Mercedes Benz 280 CE



Árgang 1978, koyrt 104.000 km, gráur, bensin, 185 HK, 2800 cc, 6 cyl. rekkjumotor. Bilurin er í góðum standi.

Ringið 216409



## BMW 525 TD til sølu



Ein hvítur BMW 525 TD. árg 12/93 til sølu. Bilurin hevur koyrt 200.000 km, lættmet. felgur, sóltak, elrútar framman, hita í forsetrum, cd-spælara við 12 fløgum. Er í góðum standi. Selist fyri 50.000 kr

*Tel 216409*


# Barnaløturnar við Elini og Óla eru enn at fáa – og nýggj er á veg

**– Elin Mouritsen og Óli Kurt Hansen gjørdu barnasendingarnar i Útvarpi Føroya eitt ikki so ógvuliga langt skifti miðskeiðis i 70'árunum. Tað er ótrúligt at hugsa um, at tey ikki vóru har meira enn gott hálvt annað ár ella so, tí nú, ið nærum 30 ár eru farin, síðani tey fóru hvør til sítt, eru tey enn kend um alt landið sum Elin og Óli i barnaútvarpinum**

FLØGA




*Fløgan við Elini og Óla, sum kom út í 2003, er framvegis at fáa – men næsta ár er nýggj fløga væntandi, so bæði børn og fyrrverandi børn hava nakað at gleða seg til…*

Soleiðis skrivar Eyðun Andreassen, professari, í umslagnum til fløguna hjá Elini og Óla _ fløgan við brotum úr viðgitnu barnasendingunum, sum vórðu sendar miðskeiðis í sjeytiárunum. Fløgan varð givin út fyri tveimum árum síðani, men er framvegis at fáa – og vit geva Eyðuni orðið aftur:

»Hugflog, íblástur, eldhugi, gleði, sjarma og spontanitetur eyðkendu ta skapandi megi í teirra barnasendingum. Sendingar teirra fóru um øll mørk. Hugans mørk og veruleikans mørk. Gott tilfar til børn skal vera markleyst, sum í ævintýrunum ella teimum føroysku skjaldrunum. Har fer nógv fram, ið ikki ber til, men altíð er eisini sumt, ið ikki ber til har heldur. Elin og Óli brutu eisini hesi innaru mørk, so at veruliga alt bar til hjá teimum. Tey skaptu ein nýggjan máta í føroyskari útvarpsgerð. Útvarpsgerð tá var tung. Alt varð gjørt við handriti og lisið upp eftir skrivaðum teksti. Elin og Óli fóru mótsettan veg. Tey tosaðu fyrst, og redigeraðu aftaná. Tey vóru eitt fullkomið makkarapar. Annað av teimum hevði ikki kunnað gjørt hetta einsamalt, og heldur ikki við einum øðrum makkara. Tey góvu hvørjurn øðrum íblástur og leiddust hond í hond - fyri ikki at siga huga í huga - út á villastu víddir, ja út um har, ið sjálvt barnsins óavmarkaða hugflog fer. Tey høvdu slik evni, ið bert fáum er beskorið.

Ein ið var so heppin at vera hjá, kundi uppliva at síggja tey fara inn í útvarpsstovuna, seta seg yvir av hvørjum øðrum við mikrofonini hangandi ímillum sín, og so síggja, hvussu tey við ongum handriti ella øðrum til hjálpar, og uttan at hava fyrireikað nakað stórvegis frammanundan, settust at tosa saman, eggja hvørt annað, koma við undarligum hugskotum og setningum, til tey fóru á glið onkra leið, ið tey funnu i samveruni, til við eitt ein heil útvarpssending var har, ið kundi halda fram í fleiri vikur eftir sama tráð.

Tey høvdu eisini evnini at flenna saman. Láturin aldaði rundan um tey, har tey sótu í útvarpsstovuni og skaptu sínar søgur og fóru sínar víðu ferðir. Kanska er tað tann smittandi láturin, ið er lykilin til teirra skapanarmegi. Tað slag av látri, ið kann bróta alt tungt og keðiligt niður, ið hópast fyri framman og tarnar gongulag og tanka.

Elin og Óli bergtóku hvørt mansbarn i Føroyurn i orðsins sanna týdningi. Ikki bara hvørt einasta barn, men vaksin við - menn og konur, ung og gomul. Tað er tíð uppá, at nakað av tilfari teirra nú verður útgivið. Eg ivist ikki i, at henda útgáva verður til gleði. Serliga hjá teimum, ið vóru børn i 70'árunum, men mann ikki okkurt stórt ella lítið barn eisini fara á hugflog við teimum nú i einurn nýggjum aratúsund?

Tað vænti eg!«

## Nýggj fløga í væntu

Tey, ið enn ikki hava ognað sær fyrstu fløguna av sendingunum hjá Elini og Óla, hava framvegis møguleikan, tí fløgan er enn á marknaðinum. Men Sosialurin hevur frætt, at til jóla næsta ár verður enn ein fløga við sendingum givin út, tí nógv tilfar liggur eftir frá tíðini hjá Elini og Óla – so tíð er at gleða seg, bæði børnum og fyrrverandi børnum…




**TOYOTA AVENSIS 2,0 LIFTBACK 5/H 136 HK**

Árg jun.98, Km 123.000. Bilurin er væl hildin og í sera góðum standi. Útgerð t.d. el-síðurútar, el-síðuspegl og sentarllás. Kr. 89.000. Bilurin hevur sleipikrók.

**Tel. 316135 / 216135**



KØKUR Í SERKLASSA FRÁ INVITA - det personlige køkken



**30% í avsláttri uppá COMET í desember**

**Sandavágs Timburhandil** · á Hillingatanga 6

Fo 360 Sandavágur · tel 332700 · fax 332701 · invita@post.olivant.fo